Avtala

millum

Føroya Arbeiðsgevarafelag / Føroya Handverksmeistarafelag
og
Føroya Handverkarafelag / Landsfelag Handverkaranna

Omanfyri nevndu partar eru samdir um niðanfyri standandi broytingar.

Kondittarar verða løntir á sama hátt sum bakarar fyri at arbeiða forskotna tíð, frá kl. 4.00 til kl. 6.00.

Fyri bakara- og kondittaralærlingar verður viðbótin sunnu- og halgidagar kl. 00.00-24.00 (alt døgnið) og frídagar broytt úr 18,89% til 35%.

Broytingarnar koma í gildi 1. mai 2024.

**Í høvuðssáttmálanum verða hesar broytingar gjørdar**:

1. Heitið á Grein 18 verður broytt til at ljóða soleiðis:

   "*§ 18.*
   *Forskotin tíð (bakarar, kondittarar og servicefak)*"

2. Grein 18, stk. 1 verður broytt til at ljóða soleiðis:

   *"Stk. 1. Bakarar og kondittarar*

   *Fyri at arbeiða frá kl. 4.00 til kl. 6.00 fáa bakarar og kondittarar 55% av vanligari sáttmálaløn sambært §10 eyka um tíman vanligar yrkadagar og 70% av vanligari sáttmálaløn sambært §10 eyka leygardag og halgidagar."*

**Í lærlingasáttmálanum verða hesar broytingar gjørdar**:

Grein 15 verður broytt til at ljóða soleiðis:

*"Fyri arbeiðir innanfyri hesi tíðarskeið verða goldnar hesar viðbøtur (forskotin tíð). Viðbøturnar verða roknaðar av serarbeiðaraløn á 1. árið.*

| ***Yrkið*** | ***Tíðarskeið*** | ***Viðbót 1. Mai 2024*** |
|---|---|---|
| *Bakara- og kondittaralærlingar* | *Allir dagar millum kl. 18.00-04.00* | *26,45%* |
| | *Sunnu- og halgidagar kl. 00.00-24.00 (alt døgnið) og frídagar* | *35%* |
| *Kokka- og tænaralærlingar* | *Gerandisdagar kl. 18-06* | *3,03%* |
| | *Leygardagar, sunnu- og halgidagar* | *4,16%* |
| *Frisørlærlingar* | *Sunnudag* | *Verður goldið eins og yvirtíð hjá lærlingum* |

Tórshavn, hin 1. mail 2024

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Kristoffur Laksá

**Føroya Handverkarafelag**

Suni Simonsen

**Føroya Handverksmeistarafelag**

Magnus Magnussen

**Landsfelag Handverkaranna**

~~Dánjal Pauli Djurhuus~~ Eli Brimsvík

**Eli Brimsvík**

---

**Fra:** Bára Gunnarsdóttir <Bara@industry.fo>
**Sendt:** hósdagur, 2. mai 2024 11:54
**Til:** Eli Brimsvík
**Emne:** Tulkingarískoyti av avtaluni millum bakarar og kondittarar

Hey Eli,

Sambært avtalu við Kristoffur, sendi eg tær hervið tulkingarískoyti av avtaluni millum bakarar og kondittarar.

Viðv. avtaluni um broytingina í høvuðssáttmálanum og lærlingasáttmálanum, dagfest hin 1. mai 2024, skulu vit vátta, at broytingarnar bert snúgva seg um bakarar og kondittarar. Avtalan fevnir ikki um líknandi ella nýggj øki, sum eru at samanlíkna við bakarar og kondittarar.

Um talan verður um nýggj ella líknandi øki, sum eru at samanlíkna við bakarar og kondittarar, verða hesi bert fevnd av hesi avtaluni um partarnir í hvørjum einstøkum føri semjast um tað.

**Vinarliga/Best Regards**

Bára Gunnarsdóttir
Ráðgevi

Phone: +298 309900 · Mobile: +298 739903
bara@industry.fo - www.industry.fo

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Føroya Arbeiðsgevarafelag

Tulkingarískoyti

Viðv. avtaluni um broytingina í høvuðssáttmálanum og lærlingasáttmálanum, dagfest hin 1. mai 2024, skulu vit vátta, at broytingarnar bert snúgva seg um bakarar og kondittarar. Avtalan fevnir ikki um líknandi ella nýggj øki, sum eru at samanlíkna við bakarar og kondittarar.

Um talan verður um nýggj ella líknandi øki, sum eru at samanlíkna við bakarar og kondittarar, verða hesi bert fevnd av hesi avtaluni um partarnir í hvørjum einstøkum føri semjast um tað.